# HS til SuSvim stevnu 26. og 27. jan. 2013 í Vági

Hey øll

Í sambandi við at vit fara til svimjikapping í Vági, skal boðast frá at vit møtast í seinasta lagi **á farstøðini leygarmorgunin kl. 06.40.** Smyril siglir kl. 07.00.

Frá Drelnesi verður koyrt suður til Vágs við bussi.

Vit búgva í Missiónshúsinum í Vági. Tað eru ongar madrassur í húsinum, so øll mugu sjálvi hava undirlag við.

Foreldur og systkin hava møguleika fyri at gista/eta saman við svimjarunum í missiónshúsinum. Tað er umráðandi at siga frá beinanvegin til Gunnleyg Ihlen, um tit ynskja at brúka hendan møguleikan, so vit hava eina hóming av hvussu nógv vit verða.

Leygardagin og sunnudagin fáa tit allar máltíðir í Missiónshúsinum. Tann fyrsta máltíðin verður í steðginum á middegi millum kappingarnar leygardagin.

**Svomið verður soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Leygarmorgun | Upphiting kl.  9:30. Kapping kl. 10.30 |
| Leygardag | Vit vita ikki nær seinnaparts kappingin byrjar aftur. |
| Sunnudag | Upphiting kl.13:00. Kapping kl. 14.00 |

**Stutt um túrin**

- Møtast á farstøðini leygarmorgunin kl. 06.40.
- Kostnaður kr. 200,- pr. svimjara, íroknað ferðagjald við Smyrli og bussi í Suðuroynni. Peningurin skal gjaldast til Gunnleyg Ihlen.
- Vít sigla við Smyrli heim aftur sunnudagin 27. nov. kl. 17.30 av Tvøroyri (í Havn uml. kl. 19.30)
- Búgva í Missiónshúsinum í Vági.
- Til kappingarnar, fáa svimjararnir frukt og bollar.

**At minnast til:**

- Undirlag og soviposa.
- Tannbust og klemmilsi.
- Svimjiklæði, brillir, svimjihettu og handklæði.
- Heit klæði og húgvu.
- Hava eti ein góðan morgunmat leygarmorgunin.
- Eitt laaaaaaangt smíl og gott lag, sum heldur alt vikuskiftið ☺

Vinarliga

**Gunnleyg, tlf. 261111**
**Ingvør tlf. 227773**
**Susann tlf. 599955**